## Úr Íslandi til Slovakia

Íslendska fyritøkan Promens, sum millum annað ger ymsar platlutir til bilídnaðin, hevur gjørt av at byggja eina verksmiðju í býnum Nitra í Slovakia, skrivar Vísir. Ein fyrimunur við at byggja verksmiðjuna júst har er, at bilverksmiðjurnar Audi, Hyundai, Opel, Skoda og Volkswagen hava deildir stutt frá Nitra. Promens rekur meiri enn 60 verksmiðjur í Evropa, Norðuramerika, Asia og Afrika. Íslendski Landsbankin er ein av eigarunum.



*Promens ger ymsar smálutir úr plasti til bilídnaðin*

*(Mynd: Vísir)*

## Byrja uppá skúla á Sandi

Í dag kl. 17.00 verður fyrsta flagið loyst fyri nýggja barnaskúlanum á Sandi. Tað verður formaðurin í mentanar og trivnaðarnevndini hjá Sands Kommunu, Lis Clementsen, sum loysir fyrsta flagið. Borgarstjórin Páll á Reynatúgvu sigur nøkur orð, og aftaná verður kaffi at fáa á kommunuskrivstovuni. Verandi Sands Skúli er frá 1884, og nýggi skúlin verður vantandi liðugur um ársskiftið. Við nýggja skúlanum fáa Sandingar tíðarhóskandi skúlakarmar til skúlanæmingar í fyrsta til og við sætta flokki.

# Umboðsráðið ein hugnaklubbur

**Í lesarabrævi í Sosialinum í gjár slær Finnleif Guttesen fast, at sovæl umboðsráð sum nevnd í Tryggingarfelagnum Føroyar eru »ryggklapparar« hvør hjá øðrum, og uppstillingin er so umstendilig, at ert tú fyrst komin inn, kanst tú sita í tað óendaliga**





*Gunnar í Liða er als ikki samdur við Finnleifi Guttesen í hansara atfinningum móti umboðsráði og nevnd í Tryggingarfelagnum Føroyar*

UMBOÐSVAL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í lesarabrævinum fýlist Finnleif Guttesen á fleiri viðurskifti, og skuldsetir umboðsráð og nevnd fyri ikki at taka sær av áhugamálunum hjá tryggingartakarunum.

Hann vísir eisini á, hvussu trupult tað er at stilla upp til umboðsráðið, tí hvørt umboð skal hava heilar 25 stillarar. Til samanberingar nýtist tær einans tíggju stillarar til løgtingsella fólkatingsval.

Tað, at tað er so tvørligt og umstendiligt at stilla upp, soldar beinanvegin eina rúgvu av tryggingartakarum frá, tí fólk tíma stutt sagt ikki alt hetta stríðið fyri at sleppa í umboðsráðið.

Hinvegin kann nevndin stilla valevni upp til umboðsráðið, og tað er áhugavert, tí tað er umboðsráðið, sum velur nevndina. Soleiðis kunnu hesir umboðsráðslimir og nevndarlimir velja hvønn annan í tað óendaliga, vísir Finnleif Guttesen á.

Í umboðsráðnum sita 23 limir, og teir sita í fýra ár. Val er annaðhvørt ár, og tá verður aðruhvørja ferð valdir 11 limir og aðruhvørja ferð 12 limir.

Eitt annað er eisini, at sum veljari mást tú gera eitt ávíst arbeiði fyri at kunna greiða atkvøðu. Tú fært ikki pr. automatikk sent atkvøðuseðil, men mást sjálvur útvega tær ein frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

### Ein metingarspurningur

Sosialurin hevur vent sær til Gunnar í Liða, forstjóra í Tryggingarfelagnum Føroyar, og sett honum spurningar viðvíkjandi viðtøkunum um val til umboðsráðið.

- Hetta eru viðtøkur, sum vórðu gjørdar í sambandi við lógarbroytingina á økinum í 1997 og samanleggingina í 1998. Framman undan var umboðsráðið valt av politisku myndugleikunum, og tí var neyðugt at gera nýggjar viðtøkur, sigur Gunnar í Liða.

Hann sigur seg ikki hava hoyrt áður, at tað skal vera ein trupulleiki at finna stillarar.

- Eg haldi í grundini ikki, at 25 stillarar er so nógv tá hugsað verður um, at stórt sæð hvør einasti føroyingur er tryggjaður hjá okkum, sigur Gunnar í Liða.

Um greinina, sum ásetur, at nevndin kann skjóta valevni upp til umboðsráðið, sigur Gunnar í Liða:

- Hendan greinin varð sett í viðtøkurnar sum ein trygdarventilur. Komu vit í ta støðu, at ov fá valevni vóru, hava vit møguleikan at fylla upp við at nevndin stillar fólk upp. Men hetta er bert ætlað sum ein møguleiki í nevndu støðum, og tað er ikki komið fyri enn, at nevndin hevur stillað valevni upp.

Forstjórin heldur tí ikki, at greinin skal takast úr viðtøkunum, men framvegis skal vera har sum ein trygdarventilur.

### Stórur áhugi

Meðan Gunnar í Liða sostatt ikki er samdur við Finnleifi Guttesen í hansara atfinningum, heldur forstjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar hinvegin, at tað kanska hevði verið eitt gott hugskot at sent atkvøðuseðil út til allar tryggingartakarar.

- Vit umhugsa júst hetta í løtuni. Vit hava onkrar smávegis tøkniligar trupulleikar at loysa, áðrenn hetta letur seg gera, men tað er væl møguligt, at vit í framtíðini fara at senda atkvøðuseðlar út til allar limirnar, sigur Gunnar í Liða.

Hann vísir víðari á, at áhugin fyri valinum er ógvuliga stórur.

- Vit hava sent út meiri enn 5000 atkvøðuseðlar, og tá er lopið ikki so langt upp til allar limirnar, sigur Gunnar í Liða.

Nakað, sum nógv verður tosað um í hesum døgum, eru nevndarsamsýningar. Slíkar letur Tryggingarfelagið Føroyar eisini.

- Okkara samsýningar eru nakað hækkaðar, men tær síggjast aftur í roknskapinum, har tær standa sum ein postur fyri seg, sigur forstjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar, Gunnar í Liða.

Roknskapurin hjá felagnum er ikki liðugur enn.